um her í Aberdeen heldur, at ein orsøk til, at bretar ikki vilja sleppa krøvum sínum og royna at fáa eina samráðingarloysn sum skjótast er tann, at stjórnin hevur upplýsingar, sum kundu bent á, at møguleikar eru at finna nógva olju í teimum økjum á føroyska landgrunninum, sum bretar krevja rættin til.

Hóast marknatrætan ikki júst er tað, sum verður tosað mest um á oljumessuni í Aberdeen í hesum døgum, so er hetta eitt mál, sum nógv fólk innan oljuverðina vísa ans.

**Bera seg at sum hjálandaveldi**

Kelda Sosialurin hevur tosað við heldur, at tað er sera umráðandi, at løgmaður ger bretum greitt, at føroyska samfelagið góðtekur ikki, at Stórabretland ger krav uppá ein stóran part av undirgrundini, sum í dag verður mettur sum ein náttúrligur partur av Føroyum.

– Bretar mugu bara faast at viðurkenna, at teir kunnu ikki bera seg at sum eitt hjálandaveldi, tí tað fer at koma teimum aftur um brekku. Bretar áttu heldur at skilt, at tað mest náttúrliga er, at fiskimark og undirgrundarmark eru tað sama, og at Føroyar hava kanska meira enn nakað land bruk fyri tí ríkidømi, sum møguliga er í undirgrundini. At føroyingar so afturfyri vilja bjóða bretum eitt samstarv um menning av eini oljuvinnu í økinum er nakað, sum átti at verið umhugsað. Tað hevði gagnað báðum pørtum og hevði so heldur ikki verið annað enn náttúrligt millum grannar, sigur keldan fyri Sosialinum.

Tað er so eisini greitt, at ein óloystur marknaspurningur kemur ikki Føroyum og føroyskum áhugamálum væl við. Tað kann blíva sera torført at fara undir eina lisensrundu, um ikki markið er ásett til ta tíð. Tað kann nevniliga væl henda, at útlendsku oljufeløgini fyrst og fremst vilja sleppa at gera kanningar í júst teimum økjum, sum ósemja er um. Um møguleiki er, verður ósemjan ikki loyst, ella onkur fyribilsloysn (interim agreement) kemur í gildi, at oljufeløgini rætt og slætt ikki vilja vága at seta nógvar pengar í at leita eftir olju í økjum, sum liggja langt frá miðlinjuni, har olja annars higartil er funnin.

So tað hevur ikki bert skund fyri bretar at finna eina loysn. Fyri áhugan hjá oljufeløgunum at gera íløgur á føroyskum øki hevur tað helst nógv at siga, at »tey bestu« økini eru tøk.

Samanumtikið má tí sigast, at báðir partar eru tvingaðir til at finna eina loysn, skal nakað ítøkiligt spyrjast burtur úr oljuleiting í teimum mest attraktivu økjunum við miðlinjuna. Men fyri Føroyar kann talan verða um týðandi avgerð, og tað kann henda, at føroyskir politikarar heldur velja at brúka ta tíð, sum er neyðugt fyri at fáa eina nøktandi loysn.

jan



*Føroyska flogfelagið og tað íslendska fara undir samstarv í næstum*




*Tað verður munandi lagaligari at kunna flúgva millum Føroyar og Grønland um Reykjavík heldur enn um Keypmannahavn*

*Avleiðing av møguligari avtalu millum Atlantsflog og Icelandair:*

# Beinleiðis úr Vágum til Reykjavík og Nuuk

*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, hevur góðar vónir um eitt gevandi samstarv við Icelandair*



Útlit eru nú til, at føroyingar ikki nýtast at fara til Keypmannahavnar, hvørja ferð teir skulu til Grønlands. Herfyri gjørdu Atlantsflog og Icelandair eina fyribils avtalu, eitt sokallað »letter of intent«, um samarbeiði í flúgvingini millum Føroyar og Ísland. Verður samstarvið til nakað, so er eisini ætlanin at fáa samband við Nuuk, soleiðis at føroyingar, sum skulu til Grønlands ella ætla sær heim úr Grønlandi, ikki longur nýtast at fara longu leiðina um Keypmannahavn til Søndrestrømfjørðin og síðani til Nuuk.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, sum í hesi vikuni hevur havt samráðingar við flogfeløg í Skotlandi um eitt møguligt samarbeiði, sigur við Sosialin, at innihaldið í avtaluni við íslendingar er, at bæði feløgini skulu býta flúgvingina sínámillum.

Atlantsflog fer at flúgva til Reykjavíkar fríggjakvøld. Mánadag flýgur Icelandair so við Fokker 50 flogfarinum til Føroya. Henda flúgvingin fer í gongd í oktober, tá vetrarferðaætlanin kemur í gildi.

Magni Arge sigur, at teir arbeiða við at fáa nýggju fríggjadagsrutuna til Reykjavíkar at hava samband við Grønlandsfly, sum flýgur til Reykjavíkar, soleiðis at tú kanst koma úr Grønlandi til Føroya sama dag. Hinvegin kanst tú eisini fara úr Føroyum fríggjakvøld, liggja náttina yvir í Reykjavík og so fara beinleiðis til Nuuk leygarmorgun.

Stjórnin í Atlantsflog vónar, at teir við hesi rutunum kunnu gagna eitt nú teimum føroyingum, sum búgva í Føroyum men arbeiða í Grønlandi.

**Ikki nakað gullnám**

Avtalan við Icelandair og samstarvið við Grønlandsfly verður ikki nakað gullnám. Tað kemur ikki at gera tann stóra munin fíggjarliga hjá Atlantic, men hinvegin meti eg, at vit vága ikki nakað stórvegis. Vit fáa tað helst at javnviga og sum tíðin frálíður vóna vit, at tað kann hjálpa til raksturin.

Magni Arge heldur eisini, at tað hevur ómetaliga nógv at siga, at vit læra okkum at samstarva við aðrar, í hesum føri Icelandair.

– Tú sleppur ikki undan í dag skalt tú klára teg, so mást tú taka upp samarbeiði við aðrar, soleiðis at tú eitt nú kann brúka teirra sølukanalir o.l.

Magni Arge heldur tað er rættiliga náttúrligt at taka upp samarbeiði við íslendska flogfelagið, tí teirra viðurskifti líkjast so nógv okkara.

Uppá fyrispurning um íslendingar eru áhugaðir fyri einum slíkum samarbeiði sigur Magni Arge, at tað eru føroyingar, sum hava tikið stig til hetta samstarv men hann ivast ikki í, at íslendingar eru eins áhugaðir í samarbeiði sum vit.

jan